Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**Ársfrágreiðing 2016**

***Felagið***

*Í nevndini í  Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum sita:*

Annika Olsen, forkvinna, Tórshavn
Brandur Sandoy, næstformaður, Sandur
Pauli T. Petersen, nevndarlimur, Vestmanna
Jógvan í Skorini, nevndarlimur, Eiði
Bogi Bendtsen, nevndarlimur, SEV
Poul Andrias Joensen, nevndarlimur, IRF



***Innihald***


1. Inngangur
2. Samráðingar 2016
3. Arbeiðsbólkar
4. Starvsetanir
5. Flokkingarmál
6. Førleikamenning
7. Evnisdagur um sálarligt arbeiðsumhvørvi
8. Kunningarferð í Reykjavík
9. Arbeiðstíðarásetingar
10. Visjónsarbeiðið
11. Skrivstovan
12. At enda

# 1

***Inngangur***

Góðu luttakarar!

Fyrst av øllum vil eg bjóða tykkum øllum hjartaliga vælkomin á ársfund okkara í Kommunala Arbeiðs-gevarafelagnum.

Sum kunnugt er áleið helvtin av nevndini í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum mannað av nýggjum í sambandi við nevndarvalið í heyst. Hóast stóra skiftið í nevndini, er nevndin mannað aftur við umboðum, sum hava nógvar royndir á politiska pallinum.

Í hesi fyrstu ársfrágreiðing míni fari eg at siga frá virksemi felagsins í 2016. Eg fari at greiða frá nøkrum av teimum mest týðandi málunum, sum arbeitt varð við í farna ári, og somuleiðis fari eg at greiða frá gongdini í samráðingunum í undanfarna ári. Eisini verður tikið samanum tær semjur og avtalur, sum gjørdar vóru í 2016. Hugt verður eisini fram á leið og ikki minst at samráðingunum, sum liggja fyri framman.

Eitt nøktandi úrslit av komandi samráðingum hongur í stóran mun saman við, hvussu væl vit hava umhugsað teir spurningar, ið væntandi fara at taka seg upp partanna millum, eins og at vit hava sett okkum eina kós. Tí er so sera

umráðandi, at kommunurnar og interkommunalu feløgini virkar sum ein felags grundvøllur, sum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið byggir alt sítt virksemi á.

# 2

***Samráðingarnar í 2016***

Sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum fóru úr gildi 1. oktober 2015. Tískil varð nógv tíð og nógv orka nýtt til at samráðast um nýggjar sáttmálar við tey ymsu feløgini.

Nakrir sáttmálar vóru gjørdir í 2015, og restin varð gjørt í 2016. Talan er í øllum førum um 2 ára sáttmálar, ið byggja á ein lønarkarm, ið er 1,9% fyrra árið og 2,25% seinna árið. Sáttmálarnir, sum blivu gjørdir í 2016, vóru:

- 12. januar 2016: Føroya Pedagogfelag
- 21. januar 2016: Tandlægeforeningen
- 19. februar 2016: Føroya Skipara- og navigatør-felag, fyri havnarmeistarar og -umsjónarfólk
- 24. februar 2016: Føroya Handverkarafelag & Landsfelag Handverkaranna
- 5. oktober 2016: Heilsurøktarafelagið
- 14. oktober 2016: Heilsuhjálparafelag Føroya
- 21. oktober 2016: Føroya Arbeiðarafelag, fyri dagrøktarar

Nýggju sáttmálarnir eru galdandi til 1. oktober 2017. Hetta merkir, at felagið longu nú fara undir at fyrireika seg til komandi samráðingar seinni í ár, soleiðis sum vanliga mannagongdin er. Tað er jú í sambandi við fyrireikandi arbeiðið, at partarnir leggja støðið undir samráðingunum við sínum høvuðskrøvum.

Við seinastu samráðingar varð avtala gjørd um fráboðanarform og -freist við tey fakfeløg, sum ikki høvdu slíkar avtalur.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið samráddust sum vanligt saman um sáttmálarnar við Pedagogfelagið. Samráðingarnar slitnaðu, og Semings-stovnurin varð innkallaður fyri at fáa semju millum partarnar.

Størsti knúturin í samráðingunum við Pedagogfelagið var ikki eitt kommunalt mál, men snúði seg um samsýningar til námsfrøðingar, ið eru praktikkvegleiðarar hjá námsfrøðilesandi. Júst hesar samsýningar fyltu sera nógv hjá okkara mótparti – ja, nógv meira, enn vit hildu vera rætt og rímiligt.

Tá ið eldraøkið bleiv flutt til kommunurnar at umsita gjørdust flestu limirnir hjá Heilsurøktarafelagnum og mest sum allir limirnir hjá Heilsuhjálparafelagnum samstundis **kommunal starvsfólk**.

KAF valdi tí at gera sáttmála við hesi feløgini. Samráðingarnar við Heilsurøktarafelagið vóru hildnar saman við Fíggjarmálaráðnum. Hetta vísti seg at rigga væl.

Av tí, at bert fáir heilsuhjálparar nú starvast hjá landinum, valdi Fíggjarmálaráðið ikki longur at gera sáttmála við felag teirra. Sáttmálin, sum KAF gjørdi við Heilsuhjálparafelagið tann 14. oktober 2016, er tí einasti sáttmálin á sínum øki. Fíggjarmálaráðið hevur avtalað við felagið, at starvsfólk hjá landinum framyvir verða sett sambært sáttmálanum hjá kommununum.

Samráðingarnar við Heilsuhjálparafelagið gingu sum heild væl, men tóku rættiliga langa tíð. Tað eydnaðist at fáa loyst nøkur týdningarmikil viðurskifti. Hetta var serliga viðvíkjandi ásetingunum um eftirløn hjá tímaløntum, ið ikki sampakkaðu so væl við tvungnu eftirlønarinngjøldunum sambært eftirlønarlógini.

# 3

***Arbeiðsbólkar***

Í semjunum fyri tíðarskeiðið 2015 til 2017 eru avtalur gjørdar um, at arbeiðsbólkar skulu kanna ymisk viðurskifti nærri. Hesir arbeiðsbólkar skulu m.a. hyggja nærri at

arbeiðstíðarviðurskftunum hjá starvsfólkum á tannlækna-stovunum, lønarbygnaðinum í Tórshavnar kommunu, veitingartrygdini hjá SEV og skipan av arbeiðinum og samsýningum til loðsar.

Ávíst virksemi hevur verið í flestu bólkunum. Viðvíkjandi samsýningum til loðsar hevur tað víst seg, at hetta arbeiðið ikki verður skipað og samsýnt á sama hátt í teimum ymsu kommunum. Arbeitt verður nú við at kanna, um tørvur er á felags reglum á hesum øki.

# 4

***Starvsetanir***

Seinasta árið hevur nógv verið at hoyra um setanar-tilgongdir í kommununum, ið ikki hava verið í samsvari við fyrisitingarligu reglurnar. Kommunala Arbeiðsgevara-felagið metir hetta vera óheppið, tí slíkt eigur ikki at koma fyri. Fyri at bøta um hetta, vil Kommunala Arbeiðs-gevarafelagið í størri mun at varpa ljós á alt regluverkið í sambandi við starvsetanir. Somuleiðis vil felagið heita á kommunur, sum hava tørv á tí, um at venda sær til felagið um ráðgeving og vegleiðing í setanarmálum og í øðrum málum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ráðgevur í nógvum setanarmálum, og hevur seinasta árið eisini í fleiri umførum havt umboð í setanarbólkum í sambandi við setanir í kommununum. M.a. hava vit luttikið í setanarbólkum í sambandi við setan av stjóra fyri eldraøkið og starvsfólka-leiðara í Tórshavnar kommunu, eins og í øðrum setanarbólkum kring landið.

# 5

***Flokkingarmál***

Sambært sáttmálum okkara á kommunala sáttmálaøkinum skulu øll størv, sum ikki frammanundan eru flokkað, t.v.s. nýggj størv, flokkast, áðrenn tey verða lýst leys alment. Ein møgulig flokking, sum ikki greitt er ásett í einum galdandi sáttmála, krevur sambært § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini góðkenning av landsstýrismanninum við fíggjarmálum.

Við tað, at okkara felag samráðist um sáttmálar og lønir á kommunala arbeiðsmarknaðinum, eiga allar flokkingar og avtalur um løn- og setanarviðurskifti á kommunala arbeiðsmarknaðinum at ganga gjøgnum felagið. Vanliga mannagongdin í sambandi við flokkingar er, at kommunurnar, eins og kommunalir og interkommunalir

arbeiðsgevarar venda sær til okkara, um at taka viðkomandi mál til flokkingar.
Í 2016 fingu vit og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar seinastu flokkingarnar av leiðarum á eldraøkinum, ið eru sjúkrarøktarfrøðingar, upp á pláss.

Av øðrum flokkingum í 2016 kunnu vit m.a. nevna flokkingarnar av húsavørðum, sum eru maskinmeistarar, dygdarmennarar á eldraøkinum, umframt innplaseringar av skrivstovufólkum á eldraøkinum.

# 6

***Førleikamenning***

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur í semjum við m.a. Starvsmannafelagið og onnur fakfelag gjørt avtalu um, at nýtt lív verður blást í avtalurnar um førleikamenning, sum longu eru ásettar í galdandi sáttmálum.

Partarnir eru samdir um, at tað hevur týdning fyri menningina av fyrisitingini, at arbeiðsgevarar regluliga og áhaldandi stinga út í kortið og leggja ætlanir viðvíkjandi førleikamenning av starvsfólki. Hetta skal gerast á ein hátt, ið tryggjar, at førleikamenningin er smidlig fyri allar partar, og sum nøktar tørvin á fakligari menning hjá einstaka

arbeiðsgevaranum og einstaka starvsfólkinum. Eisini skal staðfestast, hvør førleiki er til staðar á arbeiðsplássinum sum heild, hvør førleiki manglar, og um almennur førleiki er, sum skal fáast til vega. Partarnir meta hetta verða neyðugt fyri at tryggja, at starvsfólk megna at taka við nýggjum avbjóðingum, so tænastustøðið alsamt verður betrað.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið arbeiðir við at gera vegleiðing um førleikamenning. Allir kommunalir arbeiðsgevarar verða kunnaðir um vegleiðingina.

Vegleiðingin um førleikamenning verður løgd á heimasíðu felagsins í næstum.

# 7

***Evnisdagur um sálarligt arbeiðsumhvørvi***

Í fleiri av semjunum fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2015 til 1. oktober 2017 er protokollat gjørt um, at partarnir skulu arbeiða fyri **einum góðum og mennandi arbeiðs-umhvørvi**.

Í protokollatinum stendur, at felag okkara skal kunna leiðslur og starvsfólk um týdningin av, at starvsfólk og leiðslur í felag tryggja eitt gott arbeiðsumhvørvi.

Í hesum sambandi høvdu vit í november 2016 vitjan av Lise Keller, Charlotte Bredal og Preben Meier Pedersen, ið greiddu frá, hvussu arbeitt verður fyri einum góðum sálarligum arbeiðsumhvørvi í Danmark. Preben Meier Pedersen er ráðgevi hjá KL, Charlotte Bredal starvast hjá fakfelagnum FOA, og Charlotte Bredahl hjá BFA (Branche Fællesskab for Arbejdsmiljø), ið er ein felagsskapur, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga í felag.

Fyrrapartin tann 25. november 2016 greiddu gestirnir starvsfólkunum hjá okkum og teimum á Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum frá, hvussu arbeiðið fyri einum góðum arbeiðsumhvørvi er skipað í Danmark. Seinnapartin var alment tiltak um sálarligt arbeiðsumhvørvi á Østrøm. Áhugin var stórur. Umleið 100 fólk komu til tiltakið.

Leivur Persson hevði eisini eina framløgu um, hvørjar reglur eru um ábyrgdina hjá arbeiðsgevarunum í sambandi við sálarligt arbeiðsumhvørvi, og hvussu Arbeiðseftirlitið nú arbeiðir við hesum. Viðmerkjast kann, at á nýggju heimasíðuni hjá Arbeiðseftirlitinum er tilfar at finna um sálarligt arbeiðsumhvørvi og hvussu vit kunnu fyribyrgja strongd hjá starvsfólki.

# 8

***Kunningarferð í Reykjavík***

Frá 16. til 19. august 2016 vóru nevnd og starvsfólk hjá okkum og hjá Kommunufelagnum á vitjan hjá íslendska kommunala arbeiðsgevarafelagnum.

Vit hava hava avtalað við m.a. Føroya Pedagogfelag, at partarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum skulu gera eitt miðvíst arbeiði við at kanna okkara lønarskipan – eisini úrvaldar starvsfólkabólkar. Haraftrat skulu vit eisini kanna møguleikarnar fyri eini nýggjari lønarskipan fyri almenna arbeiðsmarknaðin sum heild.

Íslendsku kommunurnar hava eina lønarskipan, har flestu størv eru flokkaði í **somu lønartalvu**. Størvini verða flokkaði eftir eina serligari starvsmetingarskipan, ið hevur fyrilit fyri ymiskum viðurskiftum, tá ið størv skulu flokkast. Grundarlagið undir hesum er eitt telduforrit úr Onglandi.

Vit vóru samd um, at skipanin er áhugaverd, men eisini, at hon tykist at vera rættiliga orkukrevjandi at seta í verk og at brúka.

Umframt at seta seg inn í kommunalu lønarskipanina í Íslandi, var eisini høvi hjá íslendingum og føroyingum at kunna hvønn annan um gongdina í undanfarnum samráðingum, eins og um onnur mál av felags áhuga.

Á ferðini varð harafturat vitjað hjá Hafnafjarðar kommunu og ymsum stovnum – har í millum á semingsstovninum – og VIRK, sum er ein stovnur, sum virkar fyri at fáa starvsfólk, sum av einhvørjari orsøk eru uttan arbeiði, út aftur á arbeiðsmarknaðin.

# 9

***Arbeiðstíðarásetingar***

KAF havt fleiri mál í sambandi við skráseting av arbeiðstíð o.l. í 2016. Hetta hongur saman við, at fleiri kommunur hava sett í verk arbeiðstíðarskráseting, t.d. við TotalView.

Tá kommunurnar seta slíka skipan í verk, verða tær ofta varugar við ymiskar mannagongdir á ymisku stovnunum. Eitt nú. hava vit í viðgjørt mál um arbeiðstíð á dagstovna-økinum í Runavíkar kommunu og Vágs kommunu – um skráseting av arbeiðstímum t.d. aftaná kl. 17.00 og fundir, sum liggja aftaná vanliga arbeiðstíð o.a.

Í Tórshavnar kommunu hava vit eisini umrøtt skrásetingina av arbeiðstíðini hjá m.a. dagstovnaleiðarum og øðrum leiðarum í kommununi.

Í Klaksvík hava vit eisini umrøtt arbeiðstíðina á tannlæknastovuni, sum partur av einum arbeiðsbólki.

# 10

***Visjónsarbeiðið***

Serliga dentur varð lagdur á at menna visjónsarbeiðið í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum í 2015, og helt hetta arbeiðið eisini fram í 2016. Stórur partur av visjónsarbeiðinum í 2016 snúði seg um samráðingarnar á kommunala arbeiðsmarknaðinum. Tó so varð orka eisini sett av til onnur viðurskifti, har í millum byrjaðu vit arbeiðið við eini felags almennari lønarskipan, skipað varð eisini sum nevnt fyri arbeiðsdegi – og evnisdegi um sálarliga arbeiðsumhvørvið – og skjøtul varð settur á ymisk arbeiði, sum halda fram í 2017.

Arbeitt verður framhaldandi við visjónsarbeiðinum í 2017. Visjónsarbeiðið varð á skránni á fyrsta fundi hjá nýggju nevndini í februar mánaði í ár. Á hesum fundinum varð víst á yvirskipaðu ætlanina fyri 2017:

- Sáttmálasamráðingarnar
- Skeið og evnisdagar
    - Evnisdagur um samráðingar
    - Skeið um samráðingar
    - Evnisdagar um sáttmálar o.a.
- Felags alment lønarlag
    - Lønarnevnd millum arbeiðsgevarar og fakfeløg

    - Arbeiðsbólkur - at lýsa lønarbygnaðin í kommunala geiranum
- Sálarligt arbeiðsumhvørvi
- Førleikamenning

Visjónsarbeiðið er eitt arbeiði, sum í sjálvum sær er í framhaldandi menning. Tískil verður arbeitt víðari á hesum øki, bæði innanhýsis á skrivstovuni og saman við nevndini. Nýggja nevndin skal sjálvsagt hava høvi til at seta síni fingramerki á framtíðar arbeiðið hjá felagnum.

# 11

***Skrivstovan***

Í 2016 hevur nakað av útskifting verið á skrivstovuni. Marin á Brúnni hevur verið í barnsburðarfarloyvi. Fyri hana arbeiddi fyrst Rannvá B. Magnussen og síðan Bjarni Mortensen. Marin á Brúnni byrjar aftur tann 1. mai 2017, og Bjarni Mortensen fer aftur í Fíggjarmálaráðið.

Ætlanin er at økja nakað um starvsfólkaorkuna, grundað á øktu uppgávurnar, ið m.a. eru komnar við, at eldraøkið varð flutt til kommunurnar at umsita.

Í løtuni starvast trý fólk á skrivstovuni: Bjarni Mortensen, fulltrúi, Rannvá B. Magnussen, løgfrøðingur (tíðar-avmarkað starv) og Anita Fuglø, leiðari.

# 12

***At enda***

Sum tað sæst á gongdini í 2016, er felag okkara í eini góðari og støðugari menning, ið er í samsvari við tær avbjóðingar, sum øktu uppgávurnar hava havt við sær. Kommunali geirin er seinnu árini vorðin munandi breiðari við teimum málsøkjum, sum vit hava fingið at umsita. Talan er í stóran mun um rakstrartung øki, ið mugu umsitast so skynsamt, sum til ber. Skal hetta eydnast, mugu sáttmálarnir fyri tey mongu starvsfólk, sum nú starvast hjá okkum, haldast á einum støði, ið fíggjarorka er til. Eitt sterkt arbeiðsgevarafelag við røttu førleikunum er ein fortreyt fyri hesum.

Takk fyri.

Tórshavn í apríl 2017

Annika Olsen, forkvinna